UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

FUGLOYAR KOMMUNA

767 HATTARVÍK
FØROYAR

Tórshavn, tann 10. mars 2021
J.nr.: 20/02080-10
At tilskila í svari
Viðgjørt: khp
Tygara skriv:

*Góðkenningarskriv*

**Byggisamtykt fyri Fugloyar kommunu**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Fugloyar kommuna í skrivi, dagfest 17. august 2020, sent Umhvørvis- og vinnumálaráðnum uppskot til broyting í byggisamtyktini fyri Fugloyar kommunu til góðkenningar.

Uppskotið snýr seg um at gera byggisamtykt fyri Fugloyar kommunu, fyri bygdirnar Kirkju og Hattarvík.

Uppskotið hevur ligið frammi tvær ferðir frá 28. oktober 2019 til 20. november 2019 og 12. mai til 2. juni 2020. Tá freistin at koma við møguligum mótmælum ella broytingaruppskotum var farin, hevði kommunan móttikið fimm mótmæli í fyrstu framløgu og trý í aðru framløgu.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og mælir í ummæli sínum frá 19. november 2020 til at góðkenna byggisamtyktina fyri Fugloyar kommunu við viðmerkingum, sí viðlagda álit frá Býarskipanarnevndini.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið tekur undir við ummælinum frá Býarskipanarnevndini.

Ráðið hevði eisini eina viðmerking til byggisamtyktartekstin, um at bara eitt frítíðarhús kann verða bygt á hvørjum sjálvstøðugum matrikli. Víst verður til vegleiðandi skriv um krøv til byggisamtyktir og øki til frítíðarhús. Hetta er nú tillagað.

Sagt verður frá, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir byggisamtyktina fyri Fugloyar kommunu.

Mint verður á, at hóast ráðið nú hevur góðkent broytingina í byggisamtyktini fyri Fugloyar kommunu eftir reglunum í býarskipanarlógini, so sleppur kommunan ikki undan at fáa til vega møguligar aðrar góðkenningar frá øðrum myndugleikum. Víst verður til kunngerð nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð.

GONGIN 7 • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN • TELEFON 30 66 00 • E-MAIL: UVMR@UVMR.FO

Hjálagt byggisamtyktartekstur fyri Fugloyar kommunu og kortskjøl fyri Hattarvík og Kirkju við átekning frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum.

Vinarliga

Anni á Hædd
ráðgevi